*Dagf. 11. juni 2020*
*HMR J. nr. 20/00515-5*

***Kaj Leo Holm Johannesen***
***landsstýrismaður***

***Svar***

***upp á***

**fyrispurning nr. 94/2019 eftir § 52a í tingskipanini um neyðtøkutilbúgving frá Sirið Stenberg, løgtingskvinnu**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Er ætlanin hjá landsstýrismanninum at seta eina neyðtøkutilbúgving í verk í sjúkrahús-verkinum?
2. Um ja, nær kann so roknast við, at hendan verður klár?

**Svar:**

**Til spurning 1**

Í 2016 varð eitt tilmæli handað politiska myndugleikanum, um hvussu ein neyðtøkutilbúgving kann skipast á Landssjúkrahúsinum. Sum spyrjarin eisini vísur á, hevur tað ikki verið møguligt at framt tilmælið í verki, tí stórur mangul hevur verið á serlæknum í kvinnusjúkum í sjúkrahúsverkinum.

Tann 1. mai í ár eydnaðist at fáa sett tann fjórða serlæknan í kvinnusjúkum í starv, og tí er grundarlag fyri at taka tilmælið frá 2016 uppaftur – endurskoða tað og møguliga tillaga tað – og fara undir eina tilgongd at seta ein neytøkutilbúgving í verk. Hesum fer landsstýrismaðurin at virka fyri.

**Til spurning 2**

Landsstýrismaðurin metir, at tað er møguligt at skipa eina neyðtøkutilbúgving í sjúkrahúsverkinum seinni í hesum árinum ella í fyrst í komandi ári.

Heilsumálaráðið, 11. juni 2020

**Kaj Leo Holm Johannesen**
landsstýrismaður